## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# BLAÐIÐ Í NÝGGJUM HAMI

Blaðið tygum sita við í dag er fyrsta eintakið av Sosialinum í nýggja sniðnum. Hetta verður eisini fyrsta vikan við trimum útgávum, sum eru dagsins blað, sum vanligar vikur kemur á gøtuna mánadag, mikudagsblaðið og vikuskiftisblaðið, ið kemur fríggjadagin.

Tað var í mars mánaði í 1990, at Sosialurin gjørdi av at økja útgávudagarnar úr trimum upp í fimm. Tað var fyri at bøta um fíggjarliga tilverugrundarlagið, at hendan avgerðin varð tikin - samstundis sum tøkniliga menningin, sum verið hevði við at blaðfólk nú sjálvi skrivaðu tekstin beinleiðis inn á teldu, sum tá gjørdi hetta møguligt.

Stórar broytingar eru farnar fram innan miðlaheimin. Støðan er tann, at vit í Miðlahúsinum nú hava tríggjar ymiskar miðlapallar: Blaðið Sosialin, útvarpsrásina Rás 2 og heimasíðuna www.portal.fo hjá Føroya Tele, umframt InternetSosialin og Sosialin í pdf-útgávu. Hesir nýggju og skjótu miðlarnir hava fingið alt størri týdning fyri tíðindaflutningin, og tí má blaðið, sum vit hava kent tað higartil, fáa eina aðra uppgávu við at hava ørvísi tíðindaflutning, sum meira er sín egin við tíðindum, kjaki, bakgrund, reportasjum, ummælum samrøðum og øðrum.

Tíðindavirksemið hjá Miðlahúsinum fer framvegis at fevna um tíðindi alt samdøgrið. Skjótu miðlarnir hjá okkum leggja enn sum áður dent á skjótu tíðindini, har Rás2 við fimm tíðindasendingum um dagin hevur fingurin á pulsinum, meðan Portalurin alt samdøgrið verður dagførdur við tíðindum.

Færri vikuligar útgávur merkir um sum vera man eisini, at haldaragjaldið lækkar. Tað kostar nú 400 krónur um ársfjórðingin at halda Sosialin, og haldarar, sum hava goldið hægra gjaldið fyri aprílársfjóðringin, fáa gjaldið góðskrivað fyri juli-ársfjórðingin. Tey, sum hava árshald, verða eisini góðskrivað fyri lækkingina í haldaragjaldinum.



***Redaktiónsfundur í Miðlahúsinum annan páskadag***
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Vit hava glett okkum sera nógv til at bjóða tykkum nýggja Sosialin, sum vit vóna, at vit verða glað fyri, og sum føroyska samfelagið í breiðari merking eisini fær gleði av.

**» Skjótu miðlarnir hava størri týdning, tí fær blaðið aðra uppgávu**

---

## Unga Tjóðveldi sigur FOKK




Undir slagorðinum **»Helvitis fokking fokk«** skipaði Unga Tjóðveldi fyri mótmælisfundi í Tinghúsgarðinum skírisaftan. Í innkallingini til fundin boðaði Unga Tjóðveldi frá, at endamálið við fundinum er eitt mótmælistiltak móti ABC samgonguni.

– Vit finna okkum ikki longur í, at ongar bygnaðarbroytingar verða framdar, at meir verður tikið frá teimum veikaru, og at meira gjøld verða løgd á vinnuna. Droppið plenuklipparan og gevið okkum veruligan politikk, sum gagnast øllum, segði Unga Tjóðveldi.

Vit ringdu í gjár til Gunnhild Dahl Niclasen, forkvinnu í Unga Tjóðveldinum at fregnast, hvør tann djúpara meiningin var í heldur ófantaliga slagorðinum **»Helvitis fokking fokk«.**

– Hatta var brúkt undir mótmælunum í Íslandi. Vit hava samkenslu við íslendingum, og hjá okkum er skilið eisini sera ringt, tí eingin tekur avgerðir um nakað, sigur Gunnhild Dahl Niclasen – og tað er sambært ungu tjóðveldisfólkunum nakað »helvitis fokking fokk«.



**» Burturvið at gera nýggjar vegir**

GUNVÁ VIÐ KELDU
Í KJAKI Á SÍÐU 13



**» Kvinnur tíma ikki eingang at telja**

BERGUN KASS
Í KJAKI Á SÍÐU 13

## 13 flogfør í illveðrinum

Tað var nógvur trafikkur í Vágum annan páskadag, og hóast veðrið var ikki av tí besta, gekk tað væl at fáa flogfør at seta seg og fara á flog. Tað endaði tó við avlýsingum í gjárkvøldið.

Átta komur skuldu verða í Vágum í gjár, men trý flogfør, sum skuldu koma úr Reykjavík, Keypmannahavn og Billund, vórðu avlýst.

Tað vóru eisini átta fráferðir, og flogførini settu kós ímóti Keypmannahavn, Billund, London og Reykjavík.

Avlýsingarnar í gjár hava havt við sær, at seinkingar hava verið í flogferðsluni í dag.

## Krígsspæl er best umtókt í heiminum

Eingin dvd-filmur, fløga ella spæl seldi so nógv í 2009, sum telduspælið Call of Duty: Modern Warfare 2 seldi. Kring heimin hevur spælið higartil seld meira enn 17 milliónir eintøk. Millum aðrar útgávur, sum seldu væl í fjør, vóru seinasti Harry Potter filmurin, spælið FIFA 10, dvd-filmurin Twilight og seinasti James Bond filmurin, Quantum of Solace.



**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Jaspur Langgaard
jaspur@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*